Handbóltshagtøl



1. deild menn

3. umfar, leygardagin 1. november
H71-StÍF 24-32 (14-15)

3. umfar, sunnudagin 2. november
VÍF-Kyndil 30-25 (17-10)
VÍF: Ingi Olsen 14, Aki Olsen 6, Sámal Joensen 4, Rógvi Nielsen 4, Finn Jørgin Olsen, Hjalmar Klein Olsen
Kyndil: Uni Wardum 6, Bárður Johannesen 4, Hans Aki Dal-Christansen 4, Hannis Wardum 3, Bárður Mikkelsen 3, Bjarni Wardum 3, Hans á Lag, Dia Midjord

Neistin-KÍF 23-28 (10-14)

Støðan

1. VÍF	3	3-0-0	100-73	6
2. H71	3	2-0-1	72-73	4
3. StÍF	3	1-1-1	80-79	3
4. Kyndil	3	1-0-2	73-75	2
5. KÍF	3	1-0-2	77-81	2
6. Neistin	3	0-1-2	70-91	1

Næstu dystirnir
8/11 StÍF-VÍF
8/11 Neistin-H71
9/11 Kyndil-KÍF
12/11 KÍF-StÍF
16/11 VÍF-H71
19/11 Kyndil-Neistin

1. deild kvinnur

3. umfar, leygardagin 1. november
Stjørnan-Neistin 20-23 (7-10)
Stjørnan: Simona Hansen 9, Joan Mudjord Joensen 3, Birgit Ryan 3, Beinta Klakkstein 2, Rannvá Andreasen, Susanna Jacobsen, Anna Kristina Olsen
Neistin: Inga Danberg 7, Mildrið Jacobsen 6, Louisa Jørgensen 4, Kára á Dunga 2, Durita Rouch 2, Rúna Wardum, Bjørg Patursson

GÍ-Kyndil 24-32 (8-16)
GÍ: Beinta Joensen 9, Sunrid Gleðsheygg 5, Maria Olsen 4, Kristine Ellingsgaard 3, Sonja Gleðsheygg 2, Linda Toftegaard
Kyndil: Lotte Sørensen 8, Brynhild Klein 7, Jórun Ludvig 4, Ann Hansen 4, Beinta Sørensen 3, Jacklin Djurhuus 3, Frida Johannesen 2, Rakul N. Joensen

3. umfar, sunnudagin 2. november
VB-StÍF 18-20 (10-9)

Støðan

1. Neistin	3	3-0-0	65-52	6
2. StÍF	4	3-0-1	88-81	6
3. Kyndil	3	2-0-1	85-66	4
4. VB	2	1-0-1	41-41	2
5. Stjørnan	3	0-0-3	58-77	0
6. GÍ	3	0-0-3	62-86	0

Næstu dystirnir
8/11 Neistin-VB
9/11 Stjørnan-GÍ
9/11 Kyndil-VB
15/11 Stjørnan-StÍF
15/11 GÍ-VB
19/11 Kyndil-Neistin

Eingin steðgar VÍF

Hondbóltur: Hóast Kyndil fótaði sær í seinna hálvleiki, vann VÍF tryggan sigur. Ingi Olsen stóð fyri dagsins avriki

1. deild menn:
VÍF-Kyndil 30-25 (17-10)

Nei, tað gjørdist heldur ikki Kyndil sum steðgaði VÍF.

Tað var heldur so, at Kyndil var um at fáa ein dyggan ósigur við sær aftur til Havnar, og tey fimm málini, sum at enda vóru á muni, vóru lítið afturímóti tí, sum tað hevði verið, um havnalíðið ikki hevði tikið sær um reiggj í seinna hálvleiki.

Vestmenningar byrjaðu sum eitt ódnarveður, teir struku avstað frá Kyndli, sum hevði trupulleikar við at steðga góða álopsspælinum hjá VÍF, og sum misnýtti, tá kjansirnir vóru frammi á vøllinum.

VÍF kom fram um 4-0, og økti síðani til 10-2 miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Tá vóru tekin til, at vestmenningar fóru at renna Kyndil fullkomliga um koll, og alt prát um, at dystirnir millum VÍF og Kyndil plaga at vera javnir og spennandi, gjørdist til ein innantóm kliché.

Í hálvleikinum vóru sjey mál á muni, 17-10 til VÍF, og allur spenningur um úrslitið í dystinum var burtur.

Ingi sentralur

Í seinna hálvleiki tók Kyndil sær um reiggj, og teir byrjaðu væl. Teir minkaðu beinanvegin leiðsluna hjá VÍF til 17-15, og VÍF, sum nærum hevði skorað sum teimum lysti fyrra hálva tíman, fekk ikki mál fyrr enn sjey minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. Tá hevði Kyndil longu gjørt fimm mál og hevði enntá brent eitt brotskast.

Men tá Hjalmar Klein Olsen og Aki Olsen gjørdu tað til 19-15 fekk VÍF aftur munin í dystinum, og tá fekk Kyndil ongantíð fatur í VÍF aftur. Restina av dystinum var munurin frá trimum málum og uppeftir, og seinasta minuttin fyri leiklok minkaði Kyndil munin frá sjey til fimm mál.


Hjá VÍF var Ingi Olsen sentralur alla tíðina. Hann gjørdi ikki færri enn 14 mál, og tá Kyndil í seinna hálvleiki gjørdi eitt ordans tak fyri at toga seg inn á VÍF, skoraði Ingi mál eftir mál og tryggjaði VÍF avgerandi munin líka til dystarin var av.


VÍF leysir av hinum

Undan dystinum var VÍF á odda saman við H71. Bæði liðini vunnu sínar fyrstu tveir dystir. Men nú eru vestmenningar farnir einsamallir fram um hini liðini, og gongdin er longu farin at líkjast henni frá í fjør, tá VÍF vann á øllum liðunum, og hini liðini vunnu á hvørjum øðrum. Tað ferdi við sær at munurin millum VÍF og hini liðini gjørdust stórur og eingin spenningur var um FM-heitið.

Men nú er so stutt frálíðið í nýggju kappingina, at skjótar konklusiónir skulu ikki gerast, men enn hevur eingin so klárað at steðga VÍF. Næstu ferð sleppa strandingar at royna seg.

ek





Neistakvinnurnar høvdu trupulleikar

Hondbóltur: Men í avgerandi løtunum gjørdu Inga Danberg og Mildrið Jacobsen munin

1. deild kvinnur:
Stjørnan-Neistin 20-23 (7-10)

Neistin hevði tað ikki lætt, tá liðið tók dystin upp við botnliðið Stjørnuna leygardagin.

Klaksvíkskvinnur vóru á heimavølli fyri fyrstu ferð í ár, og tær vistu, at verða ikki lættar at taka í Klaksvík.

Stjørnan legði betri fyri og fór fram um 5-2. Men so steðgaði liðið upp, og seinnu 22 minuttirnar av fyrra hálvleiki gjørdu tær ikki meira enn tvey mál.

Tað var at tá alt kom til alt hesin partarin av dystinum, sum gjørdist munurin millum liðini.

Neistin fór frá 2-5 til 7-2 og í hálvleiknum vóru gestirnir frammanfyri 10-7.

Í seinna hálvleiki royndi Stjørnan at koma fyri seg aftur, og tað eydnaðist eisini – partvís.

Tær vóru fleiri ferðir við at fáa Neistan aftur, men í avgerandi løtunum gjørdu Inga Danberg og serliga Mildrið Jacobsen munin.

Mildrið gjørdi seks mál, og tá Stjørnan setti Rannvu Andreasen at mansverja Ingu Danberg, gjørdist Mildrið meir sentral og við góðum skotum var hon við til at tryggja Neistanum munin, sum hevði við sær sigurin og tvey stig aftur at.

Breiddin ikki tann sama

Stjørnan striddist væl í seinna hálvleiki, men Neistin hevði allatíðina munin, og vann eisini uppiborið.

Neistaliðið er ikki tað sama, sum tað var í fjør, og liðið líður nakað undir at fleiri stuðulspælarar eru givnir í senn, men liðið hevur framvegis so stóra breidd, at tað hoyrir heima í oddinum.

Stóra uppgávan hjá liðnum verður tvíleyst, tá hitt havnaliðið skal vinnast í grannadysti, sum verður 19. november.

Stjørnan hevur ikki fingið nakað stig enn, men halda tær fram um frálíka innsatsin móti Neistanum, gongur tað ikki long tíð áðrenn liðið hevur fingið fyrstu stigini.

Næstu ferð skal Stjørnan spæla móti GÍ, og tað verður dysturin millum liðini, sum higartil einki stig hava fingið í kappingini higartil í ár.


ek

Kyndil heldur kósina

1. deild kvinnur:
GÍ-Kyndil 24-32 (8-16)

Eftir tapið í fyrsta umfarið hevur Kyndil sett ferð á, og liðið heldur nú kósina fram móti oddinum í kappingini. Leygardagin spældi Kyndil á Kambsdali og aftur hesaferð vunnu tær tryggan sigur. úrslitið var 32-24 og í hálvleiknum var Kyndil á odda 16-8. Topskjótti var Lotte Sørensen við átta málum. Hjá GÍ skoraði Beinta Joensen 9 mál.

ek



StÍF'arnir leggja nógv fyri í verjupartinum, tá hoyvíkingar royna at bróta ígjøgnum. Mynd: Alvur Haraldsen

H71 tapti fyri StÍF

1. deild menn:
H71-StÍF 24-32 (14-15)

Tað var helst eitt sindur óvæntað, men tað var eingin sum helst ivi.

StÍF vann tryggan sigur á liðnum, sum mong hava hildið verða einasta veruliga boðið til at geva VÍF mótstøðu í ár, H71.

Hoyvíkingar løgdu væl fyri í kappingini og vunnu báðar sínar fyrstu dystir, men teir komu niður á jørðina, tá strandingar settu teir uppá pláss leygardagin. Úrslitið av dystinum var heili 32-24 til StÍF, eftir at bert eitt mál hevði verið á muni í hálvleiknum.

Arthur Johansen gjørdi 13 av málunum hjá StÍF, meðan Poli Hansen gjørdi fimm. Hjá H71 skoraði Halgir Dahl-Olsen átta mál og Hans Guðmundsson seks.

Úrslitið hevði við sær at VÍF nú er einsamalt á odda, H71 er framvegis nummar 2, og StÍF hevur nú tikið seg fram á triðja plássið.

ek

Neistin er nú aftast

Hondbóltur: Kollfirðingar vunnu botndystin móti Neistanum, sum nú er aftast

1. deild menn:
Neistin-KÍF 23-28 (10-14)

Sunnudagin spældu Neistin og KÍF botndyst í høllini á Hálsi, og tað vóru gestirnir úr Kollafirði, sum vóru omanå, tá avtortaði.

KÍF vann dystin 28-23, eftir at teir vóru á odda 14-10 í hálvleiknum.

Undan dystinum hevði KÍF einki stig meðan Neistin hevði eitt, og úrslitið hevði tí við sær, at KÍF tók seg fram um Neistan.

Hjá KÍF gjørdi Jóan Pauli Olsen, Petur Martin Poulsen og Eddie Joensen seks mál í part. Hjá Neistanum var tað sum ikki einaferð Kári Mortensen, sum gjørdi felst mál, hann gjørdi seks. Benny Vium og Páll Nolsoy gjørdu fimm mál hvør.

ek



Petur Martin Johansen stríðist við Neistaverjuna. Mynd: Alvur Haraldsen